# ÍA lætti sær á

Felagið hjá Julian Johnsson vann sunnudagin 3-1 á útivølli móti Vali, og eru nú á fjórða plássinum í íslendsku landsbankadeildini.

VAálur var annars liðið, sum byrjaði best, tá teir tíðliga í dystinum løgdu seg á odda, men við tveimum málum frá Gúðjon Sveinsson og einum frá Jóhann Hreiðarsson hevði ÍA koppað øllum undan steðginum. Seinnu trý korterini var ikki so nógv lív í, sum tað hevur verið undan steðginum, og uttan at gera alt ov nógv burturúr kundu Julian og teir koyra sigurin heim. Føroyski landsliðsmaðurin var á vøllinum í samfullar 90 minuttir.

-jm

# Molde javnaði og misti í yvirtíðini

**Við einum dramatiskum endaspurti móti Molde fekk Aalesund sín fyrsta sigur nakran tíð í bestu norsku deildini**

NOREG
*Jákup Mørk*

Jákup Mikkelsen sat sum vant á beinkinum og hugdi at, tá Molde um vikuskiftið enn einaferð staðfesti, at tað er langt upp til formin frá í fjør, tá liðið bert var minuttir frá møguleikanum fyri Champions League fótbólti.

Um vikuskiftið tók Molde ímóti Aalesund, sum fyri fyrstu ferð er í bestu deildini, og undan hesum framvegis átti fyrsta sigurin til góðar.

Tað gera teir ikki longur, tí eftir 90 dramatiskar minuttir fekk Aalesund øll stigini við sær úr Molde.

Bert eitt korter inn í dystin legð Aalesund seg á odda við einum skjotum kontra, eftir at Molde annars hevði havt mesta trýstið, og minuttin eftir var skelkurin fullkomin hjá Molde, tá enn eitt Aalesund-álop endaði í málinum.

Molde royndi tó at stríða seg aftur í dystin. Einar tíggju minuttum høvdu teir minkað um munin, og so var at trýsta. Tað sá tó leingi út til at gerast úrslitaleyst, tí Aalesund megnaði fram til 93. minutt at standa ímóti trýstinum. Tá stútaði Daniel Berg Hestad bóltin inn, og lættin hjá áskoðarum var stórur, nú eitt stig kortini skuldi fáast úr dystinum, og Molde harvið slapp undan fullkomnu eyðmýkingini.

Men Aalesund vildi tað øðrvísi. Teir góvu bóltin upp, fóru í álop og gjørdu ikki mætari enn at senda bóltin í netið, beint áðrenn dómarin brikslaði fyri seinastu ferð.

Við hesum er Molde nú dottið niður á 11. pláss í bestu norsku deildini, og tó at teir hava ein dyst til góðar, so er einki at siga til, at vónríku áskoðararnir av álvara eru farnir at krevja av leiðsluni, at okkurt verður gjørt.




*Tað er einki forgjørt í tí, at teir í Molde hanga nakað við høvdinum í løtuni. Sunnudagin vóru teir fyri eyðmýkjandi tapi, tá Aalesund vann sín fyrsta nakran tíð í bestu deildini*

# Brøndby snávaði í Silkeborg

**Eftir at tað hevur haltað hjá teimum síðstu umførini, eydnaðist tað hjá Farum, sum er nýggjasta felagið í superliguni, at vinna bronsukrónurnar**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað vil so vera. Hýrurin í umklæðingarhølunum var ymiskur kring Danmark seinnapartin sunnudagin. Sjálvandi var hann bestur í Parkini, har teir í FCK fegnaðust um glæsiliga avrikið ímóti AGF og gullkrónurnar. Í AGF umklæðingarrúminum kundu teir væl liva við at hava lagt rygg til 4–1 tap. Málið hjá teimum hevur alt kappingarárið verið at varðveita plássið í bestu deildini. Tað málið rukku teir í síðstu viku.

Miðverjin Zivkovic stútaði í 19. minutti FCK framum eftir hornasparksinnlegg, og tað var eisini eftir hornasparksinnlegg, at Todi Jónsson í 43. minutti stútaði til 2–0. Í 53. minutti økti Hjalte Bo Nørregaard, sum mikukvøldið í Brøndby skoraði fyri fyrstu ferð fyri FCK, til 3–0, og Thomas Røll økti umvegis stólpan til 4–0 úr ellivu metrum, tá ið tíggju minuttir vóru eftir. Í síðstu løtu pyntaði AGF eitt sindur um.

Brøndby tóktist undan dystarbyrjan í Silkeborg at hava ásannað, at tað var á heimavølli mikukvøldið í síðstu viku, at teir mistu møguleikan at vinna DM. Fyrru trý korterini tóktust teir ikki vera komnir fyri seg eftir 1–0 vónbrotið ímóti FCK. Longu niðurflutta heimaliðið legði seg á odda 2–0. Eftir steðgin var fyrstu løtuna væl meiri bit í Brøndby. Mattias Jonsson, sum mikukvøldið var stóri misnýtarin, tá ið Brøndby hevði møguleikan at leggja seg framum 1–0 og harvið so at siga tryggja sær DM, skoraði tíðliga í 2. hálvleiki tvey mál.

Men Silkeborg vildi tað øðrvísi enn tap í síðstu royndini í bestu deildini á hesum sinni. Teir løgdu seg framum aftur, og eftir at Brøndby eina ferð afturat hevði javnað, hevði Silkeborg orku til í síðstu løtu at skora sigursmálið. Í Brøndby verjuni, har tað heldur ikki hesa ferð var pláss fyri Jón Róa Jacobsen, tóktust teir ikki heilt væl nøgdir við málverjan. So kanska Karim Zasa kortini fer at fáa møguleikan, tá ið hann nú flytir úr OB og til Brøndby.

## Vónbrotini

Í Esbjerg og í Ikast/Herning var fótbóltshýrurin vánaligur sunnudagin. Bæði Esbjerg og FCM hava leingi verið evni til bronsuplássið, og bæði liðini snávaðu, tá ið bronsan skuldi takast inn um stokkin.

Esbjerg hevði vitjan av AaB, sum leingi hevur verið í niðurflytingarvanda. AaB tryggjaði sær í síðstu viku í hvussu so er eitt ár afturat í bestu deildini. Síðani tá hevur venjarin sagt upp. Tá ið AaB segði venjaranum farvæl í Esbjerg, gjørdu teir tað orduliga, tí AaB vann 1–0, og harvið misti Esbjerg møguleikan at vinna heiðursmerkir.

FCM hevði vitjan av AB, sum leingi hevur verið í tungum sjógvi. Talan var um fínt undirhald, tí úrslitið var 3–3. Tað kundi heimaliðið, sum steðgaði upp fyri teimum vikum síðani, ikki brúka til so nógv.

Í Køge hava teir langt síðani sagt farvæl við superliguna. Og tað eydnaðist ikki at fáa nakað burturúr kanska síðstu royndini nakrantíð hjá Køge í bestu donsku fótbóltsdeildini. Í síðstu viku gjørdi felagið av at samráðast við uppflutta Herfølge um samanlegging. Men tað er eitt sindur óvist, hvussu tað verður við hesum, tí nú tykist Herfølge ikki at vera so ógvuliga áhugað. OB, sum endaði á fjórða plássinum, vann 2–1 í Køge.

## Teir glaðu

Burtursæð frá í umklæðingarrúminum hjá FCK í Parkini, so mundi hýrurin vera bestur í umklæðingarrúminum hjá heimaliðnum í Farum.

Eftir at nýggja felagið í bestu deildini leingi hevði verið við til at mynda toppin, tóktist tað fyri einum mánað síðani at vera steðgað upp. Men so hevði Farum hepnið, sum skal til. Kappingarneytarnir til bronsuplássið snávaðu ferð eftir ferð, og tá ið mest um galt, vann Farum. Fyri fyrstu ferð í fleiri vikur høvdu teir sunnudaign alt fólkið tókt, tá ið Viborg vitjaði. Farum vann 1–0, og harvið vóru tað teir, sum fingu bronsukrónurnar. Tá ið hetta var fyrsta árið hjá Farum í bestu deildini, so sigur tað seg sjálvt, at hetta eisini vóru fyrstu bronskumerkini, sum teir nakrantíð hava vunnið í superliguni.

Næstu tvær vikurnar verður so at siga eingin fótbóltur í Danmark. Bestu fótbóltsspælararnir fara at hvíla seg. Men so verður farið undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Sjøtul verður settur á tað sunnudagin 27. juli.



# Óli og teir fluttu niður




*Óli Johannesen og Hvidovre vórðu á seinasta leikdegi noyddir at ásanna, at tilveran hjá felagnum nú skal vera í triðbestu donsku deildini*

**Alti Gregersen rýmir úr Randers, og tað verður betri pláss fyri Christian Høgna í Vejle álopinum, eftir at Ulrik Balling er fluttur til Århus**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað hevur leingi sæð svart út, og sunnudagin gjørdist tað til keðiligan veruleika. Felagið hjá liðformanninum á føroyska fótbóltslandsliðnum, Hvidovre, gjørdist ov stutt í kappingini fyri at sleppa undan niðurflyting. Teir taptu sunnudagin 1–0 í Fredericia, og harvið endaðu teir triði aftast og fluttu niður. Fredericia vann bronsumerkini. Herfølge og Frem, sum langt síðani hava tryggjað sær uppflyting, vunnu bæði í vikuskiftinum.

Óli Johannesen, sum áður hevur roynt at flyta niður við TB, hevur ikki enn tikið støðu til, hvar hann fer at spæla eftir summarfrítíðina. Men tað er lítil ivi um, at pláss í triði bestu donsku deildini neyvan er nóg góð dystarvenjing hjá Óla, sum framvegis tykist áhugaður í at verja landsliðsplássið og harvið at økja um mettalið í landsdystum.

Sunnudagin varð eisini greitt, at tað verður eitt av stórfeløgunum í Odense, sum saman við Hvidovre og HIK úr Keypmannahavn skal flyta niður úr 1. deild. Talan er um B1909. Teir taptu 3–1 í Haderslev og tóku tískil ikki av møguleikanum fyri bjarging, sum stóð teimum í boði, tá ið kappingarneytarnir í Odense, B1913, taptu 3–0 á heimavølli ímóti Randers Freja.

Randers Freja endaði á fjórða plássinum, og Vejle, sum fann eitt sindur av melodinum aftur nú fram ímóti kappingarenda, vann 3–1 á Eysturbrúgv í Keypmannahavn ímóti Skjold. Harvið endaði Vejle á fimta plássinum.

## Fleiri skiftingar

Nú kappingarárið er av, er tað greitt, at talan verður um fleiri broytingar og skiftingar hjá føroysku spælarunum í næstbestu donsku deildini.

20 ára gamli Atli Gregersen, sum seinastu árini hevur stríðst fyri plássi í miðverjuni hjá Randers Freja, er loystur frá sáttmálanum. Tað hevur hann sjálvur ynskt, og Lars Olsen, venjarin, og felagið hava einki havt ímóti tí. Venjarin hevur sagt unga føroyska spælaranum, at tveir spælarar standa frammanfyri hann í bíðirøðini at sleppa framat í miðverjuni. Tí heldur Atli, sum hevur spælt seytjan ferðir á besta Randers liðnum, at tað er best fyri hann og fótbólts frarmtíðina hjá honum, at hann fer at royna seg onkra aðra staðni. Hvar tað verður er ikki greitt enn.

Hóast Christian Høgni Jacobsen sunnudagin var við NSÍ á Mølini á Eiði, so er hann framvegis sáttmálabundin í Vejle. Har hevur venjarin ikki havt boð eftir honum tær síðstu nógvu ferðirnar, men nú er kanska møguleiki fyri, at tað fer at lýsna eitt sindur.

Ulrik Balling, sum í fjør var eitt skifti í NSÍ, hevur verið sannur brandur í Vejle álopinum í vár. Tað hevur verið ein av orsøkunum til, at Christian Høgni ikki hevur spælt so nógv.

Ulrik Balling hevur ikki havt yrkissáttmála. Teir í Vejle siga seg hava arbeitt við hond og fót fyri at skaffa álopsspælaranum arbeiði, men tað hevur ikki eydnast, og nú flytir Ulrik Balling til Århus. Har skal hann spæla við FC Århus. Balling hevur áður spælt við Århus Fremad, sum er sama felag, ið nú eitur FC Århus.

Tá ið Henrik Brandenburg tók við sum Vejle venjari, setti hann Christian Høgna Jacobsen av høgra vongverjanum. Hann metti Christian Høgna at vera álopsspælara og ikki vongverja, men Christian Høgni fekk fáar møguleikar frá nýggja venjaranum. Nú hevur Vejle aftur skift venjara. Nýggjur venjari er Steen Thychosen, sum higartil hevur verið ítróttarstjóri. Hann var í síni tíð vandamikil álopsspælari í Vejle, sum eisini royndi seg uttanfyri landoddarnar. Nú fæst at síggja, um hann ætlar at hava Christian Høgna Jacobsen á liðnum.

Í Vejle hava teir ásannað, at teir neyvan einsamallir fara at megna at sleppa framat aftur í superliguni. Tí leita teir eftir einum ella fleiri feløgum at samstarva við. Men enn er einki ítøkiligt komið burturúr ætlanunum.

### Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK | 33 | 17 | - | 10 | - | 6 | 51 | 32 | 19 | 61 |
| 2 Brøndby (M) | 33 | 15 | - | 11 | - | 7 | 61 | 35 | 26 | 56 |
| 3 Farum | 33 | 16 | - | 3 | - | 14 | 49 | 58 | -9 | 51 |
| 4 OB (S) | 33 | 12 | - | 12 | - | 9 | 55 | 50 | 5 | 48 |
| 5 Esbjerg | 33 | 12 | - | 11 | - | 10 | 65 | 57 | 8 | 47 |
| 6 AaB | 33 | 14 | - | 4 | - | 15 | 42 | 45 | -3 | 46 |
| 7 FCM | 33 | 11 | - | 11 | - | 11 | 49 | 45 | 4 | 44 |
| 8 Viborg | 33 | 11 | - | 10 | - | 12 | 58 | 55 | 3 | 43 |
| 9 AB | 33 | 10 | - | 12 | - | 11 | 44 | 48 | -4 | 42 |
| 10 AGF | 33 | 10 | - | 10 | - | 13 | 49 | 59 | -10 | 40 |
| 11 Silkeborg | 33 | 9 | - | 9 | - | 15 | 52 | 54 | -2 | 36 |
| 12 Køge | 33 | 8 | - | 3 | - | 22 | 45 | 82 | -37 | 27 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

### Danska 1. deild

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Herfølge | 30 | 22 | - | 3 | - | 5 | 74 | 38 | 36 | 69 |
| 2 Frem | 30 | 18 | - | 4 | - | 8 | 64 | 43 | 21 | 58 |
| 3 Fredericia | 30 | 14 | - | 9 | - | 7 | 50 | 29 | 21 | 51 |
| 4 Randers F. | 30 | 15 | - | 6 | - | 9 | 65 | 49 | 16 | 51 |
| 5 Vejle | 30 | 15 | - | 4 | - | 11 | 65 | 58 | 7 | 49 |
| 6 HFK Sønderj. | 30 | 13 | - | 8 | - | 9 | 64 | 54 | 10 | 47 |
| 7 Skjold | 30 | 14 | - | 4 | - | 12 | 50 | 38 | 12 | 46 |
| 8 Ølstykke | 30 | 11 | - | 8 | - | 11 | 65 | 61 | 4 | 41 |
| 9 FC Aarhus | 30 | 12 | - | 4 | - | 14 | 53 | 56 | -3 | 40 |
| 10 Brønshøj | 30 | 11 | - | 6 | - | 13 | 48 | 53 | -5 | 39 |
| 11 AC Horsens | 30 | 9 | - | 9 | - | 12 | 45 | 49 | -4 | 36 |
| 12 B 93 | 30 | 10 | - | 6 | - | 14 | 44 | 52 | -8 | 36 |
| 13 B 1913 | 30 | 8 | - | 6 | - | 16 | 37 | 60 | -23 | 30 |
| 14 Hvidovre | 30 | 7 | - | 8 | - | 15 | 34 | 57 | -23 | 29 |
| 15 B 1909 | 30 | 7 | - | 7 | - | 16 | 52 | 75 | -23 | 28 |
| 16 HIK | 30 | 5 | - | 6 | - | 19 | 37 | 75 | -38 | 21 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre)

### Norska tippeligan

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rosenborg | 11 | 9 | - | 2 | - | 0 | 30 | 7 | 23 | 29 |
| 2 Stabæk | 11 | 5 | - | 4 | - | 2 | 19 | 13 | 6 | 19 |
| 3 Viking | 11 | 4 | - | 6 | - | 1 | 19 | 12 | 7 | 18 |
| 4 Sogndal | 11 | 5 | - | 3 | - | 3 | 20 | 15 | 5 | 18 |
| 5 Odd Grenland | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 17 | 21 | -4 | 17 |
| 6 Bodø/Glimt | 10 | 4 | - | 4 | - | 2 | 14 | 11 | 3 | 16 |
| 7 Lyn | 11 | 4 | - | 3 | - | 4 | 16 | 19 | -3 | 15 |
| 8 Bryne | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 20 | 17 | 3 | 12 |
| 9 Vålerenga | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 14 | 13 | 1 | 12 |
| 10 Lillestrøm | 11 | 2 | - | 6 | - | 3 | 10 | 16 | -6 | 12 |
| 11 Molde | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 13 | 17 | -4 | 11 |
| 12 Aalesund | 11 | 1 | - | 5 | - | 5 | 15 | 21 | -6 | 8 |
| 13 Brann | 10 | 1 | - | 4 | - | 5 | 10 | 22 | -12 | 7 |
| 14 Tromsø | 11 | 1 | - | 3 | - | 7 | 15 | 28 | -13 | 6 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

### Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fylkir | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 11 | 5 | 6 | 12 |
| 2 FH | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 10 | 6 | 4 | 11 |
| 3 KR | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 7 | 8 | -1 | 10 |
| 4 ÍA | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 8 | 5 | 3 | 9 |
| 5 ÍBV | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 12 | 10 | 2 | 9 |
| 6 Þróttur | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 9 |
| 7 KA | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 8 | 6 | 2 | 8 |
| 8 Valur | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 8 | 12 | -4 | 6 |
| 9 Grindavík | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 7 | 11 | -4 | 6 |
| 10 Fram | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 2 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)